

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 10 - 2012

# 52 tyrlur settar aftan á neyðlending

Óhappið, tá ein tyrla noyddist at neyðlenda í Norðsjónum mánadagin, hevur nú havt við sær, at allar tær 52 tyrlurnar av sløgunum Eurocopter EC 225 og AS332 Super Puma í Noregi og Bretlandi eru tiknar úr flúgving. Feløgini, sum eiga tyrlurnar, eru tey bretsku CHC, Bond Helicopters og Bristow og norsku feløgini CHC Helikopter Service og Bristow Norway. Rene de Jong hjá Bristow sigur við Aftenbladet, at aftan á óhappið í Norðsjónum eru tyrlurnar hjá felagnum til eitt umfatandi tekniskt eftirlit. Hendingin, tá ein Eurocopter EC-225-tyrla neyðlendi á hetlendska økinum í Norðsjónum er tað fjórða álvarssama óhappið í bretskum øki tey seinastu fýra árini. Tað er ikki greitt enn, hví tyrlan noyddist at neyðlenda á sjónum, men okkurt bendir á, at brek var við gearkassanum og oljutrýstinum.